**Fiskimálastýrið**
*Sjóvinnufyrisitingin*

# Fulltrúi

Starv sum fulltrúi á Sjóvinnufyrisitingini verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Sjóvinnufyrisitingin er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

**Starvið inniber m.a. hesar upppgávur:**
- hava um hendi umsitingina av Manningarlógina, Sjómannalógina, Mynstringarlógina og Trygdarmiðstøðina fyri sjófólk í Klaksvík
- hava um hendi umsitingina av sjóvinnubrøvum
- samskipa leiklutin hjá Sjóvinnufyrisitingini í verkætlanum viðvíkjandi útbúgving av sjófólki
- samstarv við leiðslu og aðrar fulltrúar í Fiskimálastýrinum um tvørgangandi uppgávur innan sjóvinnumál
- luttaka í arbeiðinum viðvíkjandi FAS-skipanini

**Førleikakrøv:**
- viðkomandi utbúgving frá hægri lærustovni
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- vera til reiðar til at royna nýggjar avbjóðingar
- kunna virka til lítar og á ein tryggan hátt í einum umhvørvi, har mál til tíðir hava nógvan skund
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Grundleggjandi royndir innan virkisøkini er ein fyrimunur.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar/deildir undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Sjóvinnufyrisitingin.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálastýrinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2002 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:
**Fiskimálastýrið, att: Sjóvinnufyrisitingin, Postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 311188 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

**Fiskimálastýrið**
*Sjóvinnufyrisitingin*

# Skrivstovufólk/Málsviðgeri

Sjóvinnufyrisitingin søkir hervið eftir einum skrivstovufólki/málsviðgera til setan skjótast gjørligt. Talan er um avloysarastarv.

Sjóvinnufyrisitingin er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- málsviðgerð innan sjóvinnulóggávu
- útgávu av sjóvinnubrøvum, siglingarbøkrum og samleikaprógvum
- átekna heilsuprógv, viðgera undantaksloyvir til mynstringar v.m.
- vanligt skrivstovuarbeiðið
- telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst viðkomandi utbúgving sum t.d.:
- skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum máli
- telduførleika á brúkarastøði
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Grundleggjandi royndir innan virkisøkini er ein fyrimunur.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Sjóvinnufyrisitingin.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálastýrinum.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2002 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið, att: Sjóvinnufyrisitingin, Postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 311188 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Mentunarstuðul
## frá mentunarnevnd Tórshavnar býráðs

2 ferðir um árið, um várið og um heystið, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentunarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meiri fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 15.apríl 2002. Merk umsóknina "Mentunarstuðul".

SNARSKIVAN

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot Partner 5 Kombi 1.9
**Árg.:** 2001
**KM.:** 1.000

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
Tlf.: 345728
Fax: 345607
e-mail: mpe@trygging.fo

at hitta mánadag – hósdag kl. 08.30–10.00
og fríggjadag kl. 08.30–16.00.

Í Býin
- hvønn hósdag

Sosialurin

# Búmerkjakapping

Nú Fuglafjarðar Mentannarhús er um at verða liðugt bygt, og væntandi verður tikið alment í nýtslu fyrst í juni mánaða, er avgjørt at skipa fyri búmerkjakapping.

Fuglafjarðar Mentannarhús hevur til endamáls at verða karmur um øll hugsandi mentannarlig tiltøk t.d. konsertir, framsýningar, stevnur, fundir, veistlir, dans o.a.

Búmerki skal kunna nýtast til alt vanligt virksemi í svart/hvítum prenti, eins væl og í litum.

Navnið Fuglafjarðar Mentannarhús skal kunna setast afturat búmerkinum.- samanseting av búmerki og navni eru tí vælkomin.

Uppskotið til búmerki kann verða í støðd A4 ella A5, men skal bæði kunna minkast og vaksast, so tað er nýtiligt á øllum, frá brævpappíri til plakatir.

Uppskotið skal verða navnaleyst og bera frámerki, sum er 5 tilvildarlig taltekn (siffur). Saman við uppskotinum skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan, sum uppskotsetarin hevur á uppskoti sínum. Í uppskotinm skal vera navnaseðil á A4-síðu, sum sigur frá navni, bústaði og telefon hjá uppskotsetarnum. Tá ið dømingin er endað, verða allir brævbjálvar latnir upp.

Dómsnevndin, ið tekur støðu til innsendu uppskot, verður henda:

Rúni Abrahamsen, arkitektur AF - Eyðun Hansen, formaður í Sjónleikarafelagnum - Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður.

Til virðislønir eru avsettar 9.000 kr.
Dómsnevndin avgerð, hvussu viðrslønirnar verða býttar. Tó skal 1. virðisløn skal ikki verða minni enn 5.000 kr.

Dómsnevndin skilar sær rætt til, ikki at nýta innkomin uppskot.

Vinnararnir verða kunngjørdir á hátíðarhaldi, í samband við at Mentunnarhúsið verður tikið alment í nýtslu.

Uppskotini verða at senda til Fuglafjarðar Sjónleikarafelag innan 10. maj 2002.

Takk fyri stuðulin.



Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
Postsmoga 14
530 Fuglafjørður

# Nýtt skeið

Lastbil
Trailara
Buss

byrjar mánakv.
18. mars kl. 19.00

(um nóg nógv tekna seg)

team85

SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298
Fartel 218777

# Valið er títt!

ør ra a a oy a
Vel eitt valevni, ið velur lívið!

www.provita.fo